miðvikan

Nr. 59 • 25. mars. 2009

**Siðsøguligt tilfar**
í Sosialinum mikudagar



**Nena Danielsen:**

# Søgan um Dánjal á Hvítanesi

**Vita koma nú í trimum pørtum at hava søguna um ein rættuligan garp, nevniliga Dánjal á Hvítanesi. Hann hoyrdi eini farnari tíð til, og hann royndi nógv í sínum nærum 100 ára langa lívi. Tí er tað eisini áhugavert at fáa søguna hjá einum slíkum manni festa á blað**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

**1. partur**

**Fremsta keldan til hesa frásøgn er verdóttir hansara Nena Danielsen, gift við Sigurd. Hon er ættað úr Syðrugøtu og hevur í síni tíð skrivað um sína ætt í Gøtu í FF-blaðnum. Seinasta heyst hevði Nena eina Miðviku-frásøgn um Hvítanes og fólkini, sum løgdu grundina til hesa bygd. Hesa ferð greiðir hon frá søguni hjá verforeldrunum, og lýsir henda søgan eina heilt aðra tíð enn okkara. Hetta er eisini ein partur av søguni hjá Hvítanesi**

Eg haldi, at tað var einaferð í sjeytiárinum, at Niels Juel Arge hevði samrøðu við Dánjal Paula Danielsen, vanliga nevndur Dánjal av Hvítanesi. Hann var abbasonur niðursetumannin Dánjal Petersen av Miðgerði í Kollafirði, og frá honum stavar ættarnavnið Danielsen. Foreldrini vóru Hanna og Bærent Danielsen.

Dánjal var føddur 21. januar 1886, og hann doyði í Havn 18. november 1983, 97 ára gamal. Ein maður, ið hevði livað eina heila øld kann siga frá nógvum broytingum og framburði. Hann kann eisini siga frá strevi og stríði fyri at náa so langt fyri at skapa okkum tað góða land, sum vit hava at búgva í.

## Grind á Hvítanesi

Dánjal segði altíð, at tað var gott at vaksa upp á Hvítanesi. Tað, sum sermerkti hesa samrøðuna í útvarpinum var, at alt var gott, har Dánjal hevði verið í arbeiði ella á skipsdekki, hóast tað mangan var baldrut, og løtur høvdu verið, har teir sóu deyðan í eyguni. Hann hevur tískil livað í samljóð við náttúruna og teir møguleikar, ið tíðin beyð.

Tað er ikki so nógv, Dánjal fortelur um uppvøksturin á Hvítanesi, men hann sigur frá tveimum grindum hann minnist. Tann fyrra var ein stór grind, ið doyði í Havn í 1896. Pápi hansara stóð og slerdi uppi á Hvítanesi á einum stykki, tey kallaðu uppi á Ryssuni, tá ið hann sær nólsoyingar glaða fyri, at grind er í fjørðinum. Grindin gekk skjótt oman gjøgnum fjørðin og var komin inn móti Bursatanga, tá ið hon kavaði og tók sjógv á bak úteftir, og tað sá út sum, at hon fór at sleppa. Eitt skip lá uttanfyri Havnina. Dánjal heldur, at tað var ferðamannaskipið Vestas. Tá ið grindin kom út móti skipinum, lótu teir akkerið fara, og grindin vendi inn aftur. Hon legði so beinini í øllum góðum.

Dánjal sigur eisini frá eini grind, tá ið hann var 13 ára gamal. Tað má so hava verið í 1899. Toftamenn løgdu at á Hvítanesi og róptu grindaboð. Hvítanesmenn høvdu keypt ein stóran bát, ið æt Fortuna. Teir fóru við í grind við honum, og Dánjal slapp við. Grindin gjørdi landgongd norðuri í Sundunum. Har átti Dánjal eina skyldkonu, ættað úr Kollafirði, sum hann kundi vitja. Táið teir høvdu fingið sín grindapart í bátin, var farið suður aftur.

Tá ið teir nærkast Hvítanesi, fóru menn at undrast á, hvat hetta hevði at týða, at sjógvurin var so reyður út frá gjónni. Tá var hent tað, at ein hvalur hevði skilt seg út frá flokkinum og var farin suðureftir. Hann var so endaður inni fyri lendingina inni á Mølini á Hvítanesi.

Allir menninir vóru í grind, men har var ein gamal maður eftir í bygdini. Hann kláraði at avlíva hvalin. So fór konufólkið av húsum og hjálptu honum at hála hvalin uppá turt. Tá ið so grindabáturin komu aftur, lógu tey og skóru grind upp á Hvítanesi. Hvalurin var 8-9 skinn. Hetta var ein rættuligur fongur. Bóndin í Hoyvík skuldi hava landpart, sum reglurnar vóru tá, og hann fekk sítt.

## Marshall mundi farið á land

Í árinum 1900 var so stórur brimgangur av landsynningi eystan, sum eingin hevði vitað um fyrr. Brimið kom heilt niðan millum húsini, og mongd av fiski lá og sløddist í túninum, tá ið avfjaraði.

Øll neystini fóru, men allir bátarnir uttan ein blivu bjargaðir. Tvey hoygg, desir, fóru eisini. Hetta



Hvítanes, teknað av Ingálvi av Reyni



Dánjal verður konfirmeraður í 1901. Fyrst hevur hann tó verið til skips og vunnið sær fyri konfirmatiónsklæðini



Mamma Dánjal, Hanna, var dóttir Skora Poul